## Seta USA uttanfyri

Meiri enn 30 lond í Latínamerika og við Karibiska Havið hava samtykt at stovna ein felagsskap, sum tey bæði norðuramerikonsku londini, USA og Kanada, ikki sleppa uppí. Tað sigur meksikanskir forsetin, Felipe Calderon, sum hevur verið vertur fyri einum latínamerikonskum toppfundi seinastu dagarnar. Høvuðsmálið á fundinum er at finna eina skipan, har tey latínamerikonsku londini kunnu avmarka ta stóru ávirkanina, sum USA vanliga hevur havt. Hetta merkir tó ikki, at Felagsskapurin av Amerikonskum Statum, OAS, skal takast av. Bæði USA og Kanada eru limir í OAS.



## Ráðharrar aftur fyri frið

Stjórnin í Sudan sigur seg nú vera til reiðar at bjóða uppreistr arfelagsskapinum JEM ráðharrasessir í landsins stjórn, um felagsskapurin vil leggja vápnini afturfyri. JEM er virkin har suðuri í Sudan og hevur í fleiri ár verið í bardøgum við stjórnarherin í landspartinum Darfur (myndin). Í síðstu viku samdust stjórnin og uppreistrarfelagsskapurin um eina fyribilsavtalu um frið í Darfur, og ætlanin er, at partarnir skulu skriva undir eina endaliga friðaravtalu í høvuðsstaðnum í Qatar, Doha. Men eygleiðarar siga, at partarnir hava ikki fult álit á hvør øðrum, tí avtalur, sum teir hava gjørt fyrr, hava sjáldan hildið leingi.

# Sólrun og Løkke vitja í Føroyum

**Eftir politiskar og persónligar ákoyringar og umskipan av stjórnini kemur Lars Løkke Rasmussen um vikuskiftið til Føroya. Hann og konan Sólrun Jákupsdóttir skulu luttaka í sendingini Hvonn Live hjá Rás2**



### FAKTA

Hvonn Live er sending hjá Rás2, sum verður send av Hvonn í Havn einaferð um mánaðin

Sendingin bjóðar talk-show, livandi tónleik, undirhald og kjak

Leygarkvøldið verður Hvonn Live aftur á skránni, og tá verða gestirnir: Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, Lars Løkke Rasmussen, Peter Laugesen, Jens Marni Hansen og Tórður Mikkelsen

Hvonn Live er at hoyra á Rás2 leygarkvøldið frá kl 20 til 22. Eisini ber til at fylgja sendingini á Hvonn

*Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen og Lars Løkke Rasmussen koma um vikuskiftið til Føroya at vera við í sending hjá Rás2*
*Mynd: Polfoto*

HVONN LIVE
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Politiska landslagið í Danmark er rúkandi heitt í hesum døgum, og í miðdeplinum er forsætisráðharrin Lars Løkke Rasmussen. Hann umskipaði í gjár stjórnina og skal nú royna at sannføra danir um, at hann er rætti politiski leiðarin hjá teimum.

Lars Løkke Rasmusen hevur verið fyri nógvum atfinningum seinastu vikurnar – eisini orsakað av privatum viðurskiftum. Løkke og familja hansara vóru í vetrarferiu sunnanfyri, og tað gjørdi eitt stórt mál í donskum miðlum. Spurningurin var, um forsætisráðharrin kundi fara suðureftir uttanfyri feriutíð hjá øllum øðrum dønum.

Føroyska kona hansara, Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen var eisini drigin upp í málið, og hon fór í danskt sjónvarp at svara spurningum um teirra feriu og um familjulívið saman við forsætisráðharranum.

Viðmerkjarin Hans Engell segði eftir hetta við Rás2, at Sólrun Rasmusen hevði klárað seg væl, og at hon hevur dugað væl sín leiklut sum forsætisráðharrafrúa.

### Interview við Rás2

Um vikuskiftið vitja Sólrun Jákupsdóttir og Lars Løkke Rasmussen í Føroyum. Tey skulu verða við í sendingini Hvonn Live á Rás2.

Har verður tosað við tey um avbjóðingarnar, sum tey hvør í sínum lagi hava - Løkke sum politiski leiðarin í Danmark og Sólrun sum fyrstafrúa. Eisini verður tosað um markið millum almenna leiklutin og privatlívið, og um hvørjar avbjóðingar forsætisráðharrastarvið hevur fyri familjuna – og um tað er prísin vert.

Hvonn Live verður sent av Hvonn í Havn leygarkvøldið frá klokkan 20. Alt verður sum vanligt útvarpað beinleiðis á Rás2

# Rentuútreiðslur skulu greinast betur

**Allir móttakarar av rentustuðuli skulu nú upplýsa, hvat matrikul nummar lánið er latið til. Verða upplýsingarnir ikki lætnir, steðgar rentustuðulin, sigur Taks**

SKATTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Øll tey, sum í dag fáa rentustuðul, fingu í farnu viku bræv frá Taks, har spurt verður um, hvat lánini eru nýtt til*

Í farnu viku fingu øll tey, sum hava lán, ið geva rætt til rentustuðul, bræv frá Taks, har biðið varð um upplýsingar um, hvat viðkomandi lán eru nýtt til.

Hetta verður gjørt, hóast Taks longu hevur viðgjørt og góðkent viðkomandi lán sum góðkend til rentustuðul. Og hóast Taks í fleiri av hesum førunum longu hevur fingið upplýsingarnar, so verður í brævinum sagt, at fær Taks ikki umbidnu upplýsingarnar, kann roknast við, at útgjaldið av rentustuðlinum steðgar.

Sofus D. Johannesen, fulltrúi á Taks, sigur orsøkina til skrivið vera, at tey hava tørv á upplýsingunum um matrikulnummar í teira skrásetingum.

- Tað er sjálvandi so, at vit í fleiri førum hava fingið avrit av skeyti v.m., tá vit hava góðkent umsóknirnar. Men nú vit kortini skuldu senda bræv út til allar borgarar, gjørdu vit av at biða um hesar upplýsingar, heldur enn at nýta nógv tíð og orku til at gjøgnumganga allar skjalagoymslur. Talan er jú um einar 14.000 umsóknir, sum eru góðkendar, og tað vildi kravt nógv arbeiði, um vit fyrst skuldu gjøgnumgingið allar hesar, fyri síðani at biða um upplýsingar í teimum førum, har vit ikki høvdu hesar.

- Sostatt er hetta ikki partur av nøkrum herdum eftirliti, men nýggja lógin ger, at vit mugu hava skilna ímillum lán til eitt nú sethús, lestur og veðhald, sigur Sofus D. Johannesen.

### Treytirnar betraðar

Í dagførdu lógini um rentustuðul eru nakrar broytingar gjørdar.

Ein er, at tað nú bert er gjørligt at fáa rentustuðul upp á lán til sjálvan bústaðin hjá móttakaranum av stuðlinum. Áður hevur tað verið so, at rentur av keypi av grundstykki, útreiðslur til byggibúning og bygging eisini vórðu góðkendar til rentustuðul, men hetta er nú broytt, soleiðis at útgjald av rentustuðuli ikki byrjar, fyrr enn flutt verður inn í húsini.

Hinvegin eru treytirnar eisini betraðar. Áður hevur loftið fyri rentustuðlinum verið rentuútreiðslur upp til 60.000 krónur fyri hvønn persónin. Hjún ella sambúgvar kundu soleiðis fáa stuðul av rentuútreiðslum upp til 120.000 krónur, men tá skuldi søkjast um at hækka grundarlagið á hvørjum ári.

Í fyrstu atløgu verður nú sagt, at talan er um samlaða upphædd fyri hvørt matrikulnummar, og í øðrum lagi er samlaða upphæddin økt úr 120.000 upp í 150.000 kr.

Hartil verða rentur av lestrarlánum og lánum til veðhald ikki longur roknaðar upp í grundarlagið. Tað vil siga, at sethúsaeigarar í dag kunnu fáa stuðul av 150.000 krónum í rentuútreiðslum fyri sethúsalán, umframt at stuðul eisini verður veittur fyri lestrar- og veðhaldslán.